# Boxing Day – »Eskju-dagurin«



Í ensktalandi heiminum verður 2. jóladagur nevndur “Boxing Day” beinleiðis týtt merkir tað “Eskju-dagurin”. Boxingday er ein almennur frídagur í Stórabretlandi, Kanada, Ný Sælandi, Avstralia, og í teimum flestu londunum, sum eru í bretska Commonwealth-samtakinum. Navnið Boxing Day stavar frá viktorianska tíðini. Tá sipað verður til viktorianska tíðina, verður sipað til árini 1837-1901, tá Victoria var drotning Bretlands, og Keisarinna hjá India. 2. jóladagur var dagurin tá tey ríku koyrdu gávur í eskjur, og fóru út á gøtu og stræti fyri at geva teimum fátæku hesar gávurnar. Enski jólasangurin “Good King Wenceslas” snýr seg um kongin Wenceslas, sum gevur einum fátækum manni vín, kjøt og ein timburbul á Sankta Steffansdegi.

Siðurin er í t.d. Stórabretlandi, at fellir Boxing Day á ein sunnudag, so gerst mánadagurin 27. desember ein frídagur. Hesir serligu mánadags-frídagarnir nevna bretar “Bank-Holidays”. Bretar hava einar 4 Bank-Hollidays um árið, so fólk kunnu halda eitt langt vikuskifti. Ikki so býtt!




















